

## Hús í Trongisvági til sølu

**(Lægsta boð: kr. 450.000 + tinglýsing og kostnað)**

Grundøkið er 1045 m2 til støddar.

Húsini eru í tveimum hæddum. Í miðhæddini er durur, gangur, baðiverilsi, kamar, stór stova og køkur – alt gjørt av nýggjum.

Í kjallaranum eru wc, baðiverilsi, gangur, trý kømur og fýrrúm.

Húsini standa væl fyri og hava stórt parkeringspláss.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøtu 9**
Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ó. J. Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
**Tlf. 31 11 45**

## Summarhús í Danmark til sølu



Húsini eru í Hønsinge Lyng Apollovej 7 á Sjællandi við Sejerø-buktina í friðarligum summarhúsumhvørvi, 25 km inn frá Sjællandsodde.

Tað eru 7 km. til Sommerland Sjælland, 2 km til strondina.

Grundøkið er 1244 m², húsini eru 86 m² og innrættað við gongd, stova og køkur saman, hjúnarúm + 3 kømur, wc, bryggers, brúsurúm og tvey amboðsrúm.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**Tlf. 216555**

## Konfirmatións-klæðir til hansara



*fáast í*

**Kallkyn** Vágsbotnur
Tel. 31 62 06

## Dagrøktari á Válinum

Søkt verður eftir dagrøktara, at byrja 1. oktober 2003.

Dagrøktarheimið skal m.a. vera innrættað soleiðis, at børnini hava rúm at spæla í og at trygt er at spæla uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Heina Holm, borgarstjóra, á tlf. 210294.

**Kvívíkar kommuna**
FO-340 Kvívík
Tlf. 421294

## Frá Zarepta

**zarepta**

Heystlega fyri 14-17 ára gomul verður frá fríggjadegnum 10. til mikudagin 15. oktober 2003.

Legan kostar kr. 450,- (ferðagjald íroknað).

Tekning av leguluttakarum á Tlf. 282140 (frá kl. 17.00 - 21.00)

Starvsfólkatekning á tlf. 284040

## Til sølu



Toyota Carina E 2.0 GLi. árg. 6/98, koyrt 100.000 km. Sera væl hildin, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 225309**

## Bilsmiður søkist

Land Rover

Søkt verður eftir bilsmiði til mekaniska verkstað okkara skjótast gjørligt. Møguligir fyrispurningar til verkstaðsleiðaran Óla Niclassen ella Derek Brockie

**D. B. Bilar** KIA

J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 310 600

Søkt verður eftir fólki til ymiskt fyrifallandi arbeiði hjá okkum, koyrikort krevst

**D. B. Bilar**

J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 310 600

## Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Danstein** Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

**Sosialurin**



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Svimjihøllin**
Í høllini starvast 20 fólk. Starvsfólki skal upp til lívbjargararoynd eina ferð um árið. Tey nema sær eisini víðkað skeið í fyrstuhjálp

**Upplatingartíðir:**
mánadag 6.45 - 9.00
og 15.00 - 20.00
týsdag 6.45 - 9.00
og 15.00 - 20.00
mikudag 6.45 - 9.00
hósdag 6.45 - 9.00
og 15.00-20.00
fríggjadag 6.45 - 9..00
og 15.00-20.00
leygardag 9.00 - 17.00
sunnudag 8.00 - 10.00
og 14.00 - 17.00
www.svimjihollin.fo

## Lívbjargari

Søkt verður eftir eini kvinnu sum lívbjargara til svimjihøllina.

Starvið fevnur umframt um arbeiðið sum lívbjargari at taka eina hond í ymiskt í tí dagliga.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera góður svimjari og hava stóru lívbjargararoyndina, annars verður skipað fyri lívbjargararoyndini á staðnum. Heilsuváttan má útvegast.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hera Olsen, svimjihallarleiðara, tlf. 31 15 50 ella Jákup Simonsen, deildarleiðara á mentamáladeildini tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir sk vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. oktober 2003. Viðmerk "Lívbjargari" á umsóknina.

## Hvørji eru útlitini fyri føroyskari oljuvinnu?

Vit bjóða til limafund **24. september 2003 kl. 19.00** á Hotel Føroyum.

*Fyrilestrarhaldarar verða Terje Hagevang, stjóri í Sagex Petroleum og serkønur í oljuleiting á Atlantsmótinum og Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.*

Kl. 19.00 Vælkomin
Kl. 19.30 Formaðurin setur Oljutingið
Kl. 19.35 Terje Hagevang leggur fram undir heitinum: "Hvørji eru útlitini fyri føroyskari oljuvinnu"
Kl. 20.00 Jan Muller tekur samum og hugleiðir um oljutilgongdina í Føroyum
Kl. 20.15 Spurningar frá áhoyrarum
Kl. 20.30 Matur og drekka

***Statoil, Atlantic Airways og Hotel Føroyar** stuðla tiltakinum.*

Vinarliga boða Vinnuhúsinum frá luttøku á telefon 311864 ella um teldupost: industry@industry.fo í seinasta lagi **mánadagin 22. september.**

Vælkomin

Vinarliga
Oljutingið

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

**Sosialurin í Sosialurin**



## Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Grundleggjandi leiðaraútbúgving

Skeiðið varar 12 dagar í tíðarskeiðnum frá 27.oktobur 2003 til 3. februar 2004

**Málbólkur**
Útbúgvingin hóskar sera væl til
- nýggjar og komandi leiðarar
- deildarleiðarar, virkisleiðarar, formenn, handilsleiðarar o.a.
- leiðarar uttan bókliga leiðaraútbúgving á millumstøði
- royndar leiðarar sum ynskja at dagføra seg sjálvar

**Innihald**
Útbúgvingin er løgd til rættis av m.a. Ledelsesakademiet ved Århus Købmandsskole og er góðkend av Ledernes Hovedorganisation í DK. Útbúgvingin fer fram á sama hátt sum Diplomleiðaraútbúgvingin. Skift verður ímillum stutt útbúgvingarmodul, sum vara 2-3 dagar, í alt 5 ferðir og heimauppgávur við støði í tínum arbeiði. Royndir og trupulleikar hjá hvørjum øðrum verður viðgjørt.

Undirvísingin tekur støðið í gerandisdegnum hjá luttakaranum. Tú fært leiðsluamboð, sum gera teg betri føran fyri at loysa tínar leiðsluuppgávur.

Tað er ein týðandi liður í útbúgvingini, at luttakararnir koma frá ymsum virkjum/arbeiðsplássum, bæði almennum og privatum. Leiðarar í almennum stovnum kunnu læra av leiðarum í privatum virkjum- og umvent. Leiðarar innan tænastuvinnuna kunnu læra av leiðarum í framleiðsluvinnuni - og umvent.

**Luttakararnir fáa venjing í m.a.**
- at seta fólk í gongd við uppgávum
- ymiskir leiðsluhættir
- at leggja egnu ætlan til rættis
- at nýta egnu tíð skilagott
- at motivera starvsfelagar og starvsfólk
- at vera ein góður leiðari í ymiskum umstøðum
- at finna góðar loysnir av trupulleikum
- persónlig virkisætlan

Grundleggjandi leiðaraútbúgving er praktisk og setir ikki serlig krøv til útbúgving fyri at verða upptikin.

Meira um útbúgvingina er á: **www. skeidsdepilin.fo.** Har kanst tú eisini tekna teg til skeiðið.

**Tíð:** 96 tímar
**Dagar:** okt. 27. 28. 29. og nov. 17. 18. des. 15.16. og jan. 12. 13. 14. feb. 02. 03.
**Skeiðleiðari:** Mogens Abildgaard
**Kostnaður:** kr. 12.000,-
Mogen Abildgaard er sera væl umtóktur sum skeiðsleiðari og hevur drúgvar royndir í at undirvísa á hesum skeiðum í Danmark.

**Tilmelding:** **Áðrenn 10. oktober 2003.**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
Tel 318813, Fax 313374

team 85 • 35800

## Minnist til haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!

– síðsti rættstundis gjaldsdagur er 28. september 2003

Arigjavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo **Sosialurin**